## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 30. mars 2023, kl. 17.00

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin varð løgd, er eitt nýtt mál innkomið. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið verður sett á skrá sum mál nr. 177.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 173**
Umraðfesting av játtan til Staðið
J.nr.: 1800002-5-2021

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt á fundi tann 23. februar 2023 mál um umraðfesting av játtan til Staðið við 1. viðgerð.

Fyri at byrja tilboðið til 4. – 6. flokk ynskir ungdómsleiðarin at seta tímalønt starvsfólk við førleikum og/ella áhuga fyri málbólkinum.

Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 200.000 settar av til at skifta vindeygu. Mentanarnevndin og Fíggjarnevndin mæltu til at umraðfesta kr. 75.000 av løgujáttanini til at skifta vindeygu yvir til rakstur, tímalønir.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 22. mars 2023 og samtykti einmælt at mæla til at samtykkja umraðfestingina við 2. viðgerð.

**Viðv. 173**
Bygdarráðið samtykti einmælt umraðfestingina við 2. viðgerð.

**Mál 174**
Eykajáttan til byggibúning
J.nr.: 30102-1-2022

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt á fundi tann 23. februar 2023 mál um eykajáttan til byggibúning við 1. viðgerð.

Vegna bíðilista til grundøkir í Vestmanna Kommunu, mælti fíggjarnevndin til eina eykajáttan á kr. 850.000 til møguligt keyp av fleiri grundøkjum í 2023.

Eykajáttanin verður fíggjað av sølu av jarðarteigum og grundøkjum fyri kr. 850.000.

Fíggjarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 22. mars 2023 og samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eykajáttanina við 2. viðgerð.

**Viðv. 174**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 2. viðgerð.

**Mál 175**
Eykajáttan til at tryggja spæliplássið omanfyri skúlan
J.nr.: 400002-2-2020

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. mars 2023 mál um at tryggja spæliplássið oman fyri skúlan. Í 2021 samtykti bygdarráðið tilboð frá Arta (fyrr Prull) á kr. 386.000 á fíggjarætlanini fyri 2022.

1. partur av arbeiðinum á kr. 128.700 varð gjørdur í 2022, tí tilfarið varð keypt, men arbeiðið bleiv ikki liðugt og bygdarráðið hevði ikki møguleika at viðgera málið til fíggjarætlanina fyri 2023.

Fyri at fáa arbeiðið liðugt, hevur Arta givið kommununi nýtt tilboð á kr. 116.700 u/mvg dagfest 13. februar 2023.

Málið varð viðgjørt á fundi hjá Bygdarráðnum tann 23. februar 2023 og varð beint aftur í nevnd.

Mentanarnevndin skeyt upp á fundi tann. 20. mars 2023 at eykajáttanin á kr. 116.700 u/mvg verður fíggjað av "keyp av tænastuveitingum annars" innan raksturin hjá Mentanarnevndini.

Fíggjarnevndin viðgjørdi uppskotið hjá Mentanarnevndini á fundi tann 22. mars 2023. Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eykajáttan sum omanfyri lýst við 1. viðgerð.

**Viðv. 175**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð.

**Mál 176**
Áseting av brúgvagjaldi fyri skip frá 500 NT og minni, sum ikki eru í drift.
J. nr. 801002-1-2023

Havnarnevndin viðgjørdi málið á fundi tann 21. mars 2023 og mælir til at dagførða gjøldini fyri skip frá 500 NT og minni, sum ikki eru í drift, við grundgeving um, at skipini ikki geva aðra inntøku enn brúgvagjaldið, at tey sum oftast einki eftirlit hava, ímeðan tey liggja her, og at tey tí liggja til ampa.

Nevndin mælti somuleiðis til, at gjaldið verður galdandi frá 1. apríl 2023 at rokna.

Niðanfyri er samanbering gjørd við verandi gjøld:

- fyri skip, sum eru upp til 100 NT: 200 kr um dagin
  - ~~verandi gjald 100 NT á 1,45 kr = 145 kr um dagin~~
- fyri skip, sum eru ímillum 100 og 200 NT: 300 kr um dagin
  - ~~verandi gjald 200 NT á 1,45 kr = 290 kr um dagin~~
- fyri skip, sum eru ímillum 200 og 300 NT: 500 kr um dagin
  - ~~verandi gjald 300 NT á 1,45 kr = 435 kr um dagin~~
- fyri skip, sum eru ímillum 300 og 400 NT: 700 kr um dagin
  - ~~verandi gjald 400 NT á 1,45 kr = 580 kr um dagin~~
- fyri skip, sum eru ímillum 400 og 500 NT: 800 kr um dagin
  - ~~verandi gjald 400 NT á 1,45 kr = 725 kr um dagin~~

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmælið frá Havnarnevndini á fundi tann 22. mars 2023 og samtykti einmælt at mæla bygdarráðnum til at samtykkja uppskotið frá Havnarnevndini.

**Viðv. 176**

Tilmælið varð einmælt samtykt, við tí viðmerking, at umsitingin orðar eina greiða lýsing av *"sum ikki eru í drift"*.

**Mál 177**
Broytingar í byggisamtyktini
J.nr.: 102002-1-2023

Tvey mál komu inn, áðrenn kærufreistin var úti tann 27. mars 2023:

- fyrispurningur frá Jaspur Andreasen um tað er gjørligt – í sama viðfangi, sum sethúsaøki verður lagt á matr. nr. 45z – at økja um sethúsaøkið á ogn hansara matr. nr. 189b, so hetta verður í somu linju, sum ætlaða sethúsaøkið á matr. nr. 45z.
J. nr. 102002-4-2023
- viðmerkingar frá Tórálvi Weihe, Tjóðsavnið, til ætlaðu broytingarnar av matr. nr. 266a frá havnarøki til miðstaðarøki

Tekniska deild mælir til at ganga fyrispurninginum frá Jaspur Andreasen á møti.

Tekniska deild mælir til at gera viðmerkingar til skrivið frá Tórálvi Weihe, Tjóðsavnið, sum lýst í skrivi frá Teknisku Deild dagf. 29. mars 2023.

**Viðv. 177**

Tilmælið frá teknisku deild varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:30

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Pauli T. Petersen Laila Haldansen

Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen